

- Míni avgjørdu ráð skulu vera, at offur fyri kynsligum ágangi skulu leita sær serkøna hjálp fyri at koma víðari við lívinum. Og tað er ongantíð ov seint at koma fram við tí, sigur Bára Joensen úr Gøtu, sum sjálv varð kynsliga misbrúkt ein stóran part av barnaárunum.

spart meg fyri nógv misbrúk og hon kundi eisini havt forðað fyri, at yngra systurin yvirhøvur kom í misbrúkið.

Men serliga fast hevur tað tikið pápanum, at hansara pápi hevur misbrúkt allar tríggjar systrarnar.

Bæði foreldrini eru illa plágað av skuldarkenslu, av at tey einki hava lagt til merkis.

- Men nú eru vit komin víðari. Vit tosa nógv saman og vit standa øll saman um hetta sum familja, eisini verfamiljan hjá mær.

- Eg royni at fortelja fyri teimum, at tað ber ikki til at liva í fortíðini, tí hon er farin

## Eg var eitt offur, men nú eri eg ein yvirlivari

og vit mugu royna at koma víðari.

### Abbin settur til svars

Allar tríggjar systrarnar hava verið hjá Kris, men tær stuðla hvørja aðra væl og tær práta nógv saman.

Tað kom eisini hartil, at Bára gjørdi av at fara á Skála at seta abban andlit til andlits við sínar gerðir.

- Hinar báðar systrarnar gjørdu av at koma við. Tær søgdu, at tær tordu ikki at siga nakað, men tær skuldu koma við fyri at stuðla og vera hjá mær.

- Tá ið vit komu inn til hansara, ætlaði hann at rýma á dyr, men eg stóð fyri honum og forðaði honum og gav honum boð um at seta seg.

Men hann vildi ongantíð viðganga tað, hann hevði gjørt.

Omman fór í verjustøðu fyri abban og ein pápabeiggi, sum eisini var inni, vardi eisini abban og helt fyri við meg, at eg hevði altíð verið so kjaftabreið.

- Men eg fekk so sagt tað, eg hevði at siga, við abban og so fóru vit á dyr.

### Meldaðu abban

Tvær vikur seinni gjørdu vit av at melda hann. Tað var eisini fyri at gera løgregluna varuga við, at her er ein maður, tey eiga at hava eyguni eftir, tí hann var framvegis bæði frískur og ferðugur.

Men hann doyði nakrar heilt fáar dagar aftan á.

- Tað var onkur, sum læt meg vita, at tað var eg, sum hevði lagt hann í grøvini. Men eg síggi tað øðrvísi, tí eg føli eg mátti seta hann til svars fyri hansara gerðir nú, áðrenn tað bleiv ov seint og hann fór at doyggja, tí hansara tíð var komin.

Omman og tann eini pápabeiggin tóku ta støðu heldur at trúgva abbanum og familjan fór mestsum í tvíningar og hevði ikki so nógv samband síðani.

- Men nú eri eg komin so mikið langt í mínari grøðingar-tilgongd, at eg havi fyrigivið ommu og eg havi eisini vitjað hana við børnunum, so at tey kunnu koma at kenna sína langommu.

Bára leggur afturat, at hóast abbin misbrúkti hana, hevur hon eisini havt øgiliga nógvar góðar løtur saman við honum, tí hann hevði eisini nógv gott í sær.

- Tað var tann tíð, tá ið eg bara hevði ring minni um abban. Nú tori eg at viðanga, at eg var eisini góð við hann – men hann hevði keðiliga síður, sigur Bára Joensen.

aki@sosialurin.fo